# Starvsmannafelagið tungt at dansa við hjá løgmanni

**– Ætlanin hjá løgmanni tænir bara einum endamáli og tað er at taka verkfalsrættin frá okkum. Men verkfalsrættin fara vit ikki at siga frá okkum, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum**

STRANDFERÐSLAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



Løgmaður skal ikki vænta sær stuðul frá Starvsmannafelagnum, nú hann ætlar at finna eina skipan, so at skipini hjá Strandferðsluni ikki aftur verða rakt av verkfalli.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, ger púra greitt, at tey fara ikki at siga verkfalsrættin frá sær.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, sigur, at royndin at finna eina skipan, sum ger siglingina hjá Strandferðsluni óhefta av ósemjum á arbeiðsmarknaðinum, hevur púrt onki við umsorgan fyri manningum á Strandferðsluni at gera.

– Hetta hevur bara eittans endamál. Og tað er at taka verkfalsrættin frá okkum. Tað er fyri at kunna stýra øðrum viðurskiftum.

Og hann leggur dent á, at Starvsmannafelagið fer ikki at siga verkfalsrættin frá sær.

– Vit fara ikki at siga verkfalsrættin frá okkum fyri at leggja hann upp í hendurnar á politiska myndugleikanum at skalta og valta við, sigur hann.

Samstundis undrar tað hann, at tað júst skal vera ein javnaðarløgmaður, sum gongur á odda at leggja slíkar hugsanir fyri dagin.

– Eg spyrji um hann í hesum førum hugsar sum javnaðarmaður og Føroya Løgmaður, ella um hann hgsar sum lokalpolitikari í Suðuroy.

Gunnleivur Dalsgarð vísir eisini á samrøðuna við formannin í Maskinmeistarafelagnum í Sosialinum í gjár.

– Tað er heilt týðiligt, at Maskinmeistarafelagið angrar, at taðgóðtók at gera maskinmeistarararnar við Vaktar- og Bjargingartænastuni til tænastumenn. Tað er eisini týðiligt, at felagið kennir seg lumpað av landsstýrinum. Men hetta vísir bara aftur, hvussu trupult tað er hjá fakfeløgunum yvirhøvur at hava álit á politiska myndugleikanum, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum.

Samstundis vísir hann á, at í nógv ár hevur tann almenni politikkurin verið, at vit skulu burtur frá tænastumannaskipanini.

Tí undrar tað hann, at vit nú skulu innføra eina tænastumannaskipan á Strandferðsluni.

– Men tað er altso bara fyri at taka verkfalsrættin frá okkum, endur tekur hann.

### Hava eisini ábyrgd

Hann sigur, at hann skilir fullvæl trupulleikarnar, sum standast av verkføllum.

– Tað kann væl vera, at verkføll mangan raka ávís øki og ávísar bólkar ,sum annars onki hava við verkfallið at gera.

– Men soleiðis er arbeiðsmarknaðurin nú einaferð innrættaður og tá ið verkfall er, kemur steðgur í samfelagið.

Samstundis vísir formaðurin í Starvsmannafelagnum á, at tað eru altso ikki bara fakfeløgini, sum hava ábyrgdina av arbeiðsmarknaðinum.

– Àbyrgdin av at viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum eru trygg, hvílur sanniliga eisini á arbeiðsgevaranum. Tað er eisini arbeiðsgevarin, sum hevur skyldu at bera so ó bandi, at sáttmálarnir eru nøktandi.

Gunnleivur Dalsgarð ávarar eisini Landsstýrið ímóti at taka einvís stig á hesum øki.

– Tað kann væl vera, at leiðarin á lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum hevur rætt í, at Landsstýrið nær tað skal vera, kann gera størvini til tænastufólk.

– Men ger landsstýrið tað, er hetta tað sama sum at gera seg inn á eitt øki, sum er umfatað av sáttmálum, sum ikki eru tænastumannastørv.

Og formaðurin í Starvsmannafelagnum sigur, at tað er als ikki so einfalt at gera seg inn á eitt , tí tað er ikki vist, at fakfekløgini fara at lata sær tað lynda uttan víðari.

# Strandferðslan og verkføll: Gongdin í málinum higartil

Í farnu viku segði Jóannes Eidesgaard, løgmaður, fyri Sosialinum, at hann fór at leggja stóran dent á at finna eina skipan, so at skipini hjá Strandferðsluni blivu óheft av ósemjum á arbeiðsmarknaðinum.

Hann segði, at verkføllini og hóttanirnar um verkføll, sum javnan hanga omanyvir skipunum hjá Strandferðsluni, eru eitt rættiliga álvarsligt mál, serliga fyri vinnulívið, sum ikki fær virka, sum tað skal.



*Smyril er tað skipið hjá Strandferðsluni, sum oftast er rakt av verkfalli. Tað skilir Starvsmannafelagið, men tað er sanniliga eisini arbeiðsgevarin, sum hevur ábyrgdina av tí, heldur Starvsmannafelagið*

Tað eru heili fimm fakfeløg, sum eru knýtt at skipunum hjá Strandferðsluni. Manningarnar eru limir í ávikavist Skipara- og navigatørfelagnum, Maskinmeistarafelagnum og Starvsmannafelagnum. Og teir, sum binda og loysa Smyril í Trongisvági, eru limir í Føroya Arbeiðarafelag og teir, sum hava sama arbeiði í Havn, eru limir í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Hvørja ferð okkurt av hesum fimm feløgunum liggur í ósemju við arbeiðsgevaran, eru skipini hjá Strandferðsluni hótt við at verða løgd.

Jóannes Eidesgaard metti hetta at vera størsta álvarsmál í føroyskum politikki beint nú og tí fór hann at raðfesta arbeiðið rættiliga frammaliga at finna eina loysn, so at siglingin hjá Strandferðsluni verður óheft av ósemjum á arbeiðsmarknaðinum.

Ein møguleiki, sum hevur verið nevndur, er, at gera tey, sum eru knýtt at siglingini til tænstufólk.

Men verða tey gjørd til tænastufólk, missa tey samstundis rættin til at fara í verkfall og løgmaður gjørdi eisini greitt, at ongin skipan verður gjørd, sum fakfeløgini ikki kunnu taka undir við.

Skipara- og navigatørfelagið er opið fyri møguleikanum. Nú felagið samráddust við Fíggjarmálaráðið fyri 14 døgum síðani, bjóðaði tað sær enntá til at gera skipararnar og stýrimenn-in-ar til tænastumenn.

Fíggjarmálaráðið tók ikki av.

Maskinmeistarafelagið er meiri ivingarsamt. Felagið hevur áður góðtikið, at maskinmenninir hjá vaktar- og bjargingartænastuni blivu tænastumenn, men tað angrar felagið í dag.

Maskinmeistararnir føla seg lumpaðar av landsstýrinum so tað stendur eftir, tí teir siga, at síðani maskinmenninir á Vaktar- og Bjargingartænstuni blivu tænastumenn, hevur landsstýrið ikki verið til at tosa við um nakað sum helst, sum hevur við teirra viðurskifti at gera.

Tí fer Maskinmeistarafelagið als ikki at góðtaka, at maskinmenninir hjá Strandferðsluni eisini verða tænastumenn, í hvussu so er ikki uttan so, at púra greiðar reglur eru fyri, hvussu viðurskiftini skulu skipast.

Men sum tað sæst á greinini á hesari síðuni, ætlar Starvsmannafelagið, sum er tað triðja, stóra felagið á Strandferðsluni, sær ikki at góðtaka, at missa verkfalsrættin.

Thomas Magnussen, leiðari á Fìggjarmálaráðnum, segði við Sosialin í gjár, at orsøkin til, at tilboðið frá Skipara- og navigatørfelagnum varð havnað, var, at tað er onki endamál at gera ein starvsbólk til tænastufólk. Antin máttu øll vera við, ella kundi tað gera tað sama.

Hann segði eisini, at starvsheitið var ikki ein samráðingarspurningur, tí landsstýrið kundi, nær tað skal vera, gera størvini til tænastumannastørv.

## Veitsla fyri Tvørabátinum

Nú eru fimm ár síðani, at felagið Tvørabáturin í Keyp-mannahavn, varð stovnað.

Ì tí sambandinum verður fimmárahald í annaðkvøld, 30. apríl.

Veitslan verður í felagshúsinum á Vesterhavsvej í Norðhavnini í Keypmannahavn

Ólavur á Heygum, oddamaður í felagnum, sigur, at felagshúsið er nýliga innrættað við veitsluhøli á 1. hædd, sum tey kalla Uppistova. Har ber til at borðreiða til næstan 100 fólk.

À veitsluni í annaðkvøld fáa tey fyrst fiskasúpan, har bótin er kalvi av flakavirkinum á Tvøroyri. Høvuðsrætturin er oksasteik við øllum góðum afturvið.

Undir borðhaldinum verður eisini eitt mentanartiltak, sum ongantíð hevur verið framført fyrr.

Men hvat tað er, verður ikki avdúkað, fyrrenn undir sjálvum borðhaldinum.

Annars hevur felagið Tvørabáturin eisini fingið tónleikaútbúnað, sum klubburin, »Cairo« í Keypmannahavn hevur goldið ein part av. Kairo er klubbur, sum vágbingurin, Danjál Thorsteinsson, eigur og útbúnaðurin skal brúkast til dans og onnur mentanartiltøk.

Umframt alt hettar, fara tey eisini at selja lutaseðlar. Peningurin, sum kemur inn, skal brúkast til at keypa ein treylara og nýggjar árar til Tvørabátin.



# Ein nýtmótans spegil

**Í Danmark finst eitt nýtt telduforrit, sum kallast Helsevagten. Hetta forritið kunnu øll nýta, um tey hava hug at betra um sína heilsustøðu, stýra vektina og tryggja, at ein fær røttu nøgdina av føðsluevnum. Ein nýmótans spegil, lýsir danskur lækni tað**

HEILSA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*




*Her eru eitt dømi uppá, hvussu yvirlit kunnu síggja út á forritinum. Hendan vísir, hvat ein hevur etið gjøgnum dagin*

*Talva: www.helsevagten.dk*

Tað er ongin ivi um, at fólk verða alt meiri og meiri tilvitað um teirra heilsustøðu og livihátt í dag. Og føroyingar eru somuleiðis alt meiri tilvitaðir um hetta. Og tað seinasta nýggja innan hetta økið í Danmark er eitt spildurnýtt telduforrit, sum eitur Helsevagten, har ein kann fylgja við sínari heilsustøðu.

Helsevagten, sum upprunaliga stavar úr Svøríki, kom fram í Danmark fyri hálvum ári síðani ella so. Forritið fekk ovurhondsstóra undirtøku beinanvegin bæði frá vanligum fólkum, professionellum brúkarum, stovnum og tí almenna.

Hugskotið er stórt sæð, at ein kann leggja inn á forritið, hvat ein etur, og hvussu nógv ein íðkar. Forritið vísir síðani, hvussu ein klárar seg í mun til ta ætlanina, sum ein leggur fyri seg sjálvan.

Brúkarin fær við hesum eina tilvitan, um hvat ein ger rætt. Og hvat ein ger skeivt í mun til heilsuna hjá einum, vektina og ta vektina, sum ein hevur sett sær sum mál.

Ein danskur lækni og professari í kolestoroli, Ulla Ischiel Træden. lýsir hetta telduforritið, sum ein nýmótans, tøkniligan spegil.

– Tá ein stendur framman fyri einum spegili, og okkurt við hárinum til dømis ikki liggur, sum tað skal, so rættar ein tað. Tað er nakað tað sama við hesum forritinum. Tú tastar inn tað, sum tú hevur etið, og so sært tú, hvat er rætt ella skeivt, og tú fært somuleiðis gjørt okkurt við tað, sigur hon. Óansæð um tað er fyri at tapa seg, ella um ein ynskir at taka eitt sindur uppá.

Telduforritið er brúkaravinarligt, og tað merkir, at øll fáa nakað burturúr at nýta tað.

Myndadømi, sum er víst á síðuni, vísir, hvat ein hevur etið til morgunmat. Síðani koma stabbamyndir upp, har eitt yvirlit er yvir, hvat fyri vitaminir og mineralir, ein hevur fingið í morgunmatinum, og hvussu nógv einum tørvar afturat hendan dagin av teimum ymsu føðsluevnunum.

Tað eru neyvan øll, sum vita, í hvørjum matvørum øll føðsluevnini finnast, men so er bara at trýsta á til dømis B vitamin á myndini. So kemur ein mynd upp, har upplýsingarnir finnast.

### Fýra stig

Helsevagten finst í fýra ymiskum stigum. Helsevagten Standard, Plus og eru ætlað privatbrúkarum, meðan Helsevagten PRO er ætlað teimum professionellu brúkarunum, sum ráðgeva øðrum til dømis læknum, starvsfólkið innan heilsuverkið, føðsluráðgevarum og persónligum venjarum.

Helsevagten er sum sagt upprunaliga svenskt forrit, sum er gjørt av einum professara í evnafrøði við tekniska Háskúlan í Stockhólmi í Svøríki. Forritið kom fram í Svøríki í 1998, og tað er í dag tað mest seljandi av sínum slagi.

Síðani 2002 hava Eva Kucharski og sonur hennara, Kaspar Vaala, arbeitt við at gera eina danska útgávu av forritinum, og kom tað út í oktober í fjør. Sum sagt hevur móttøkan verið avbera góð, og Eva sigur, at nú eru tey byrjað at fáa fyrispurningar úr Føroyum eisini.

Tey hava bæði drúgvar royndir á arbeiðsmarknaðinum, hon sum sosialráðgevi og føðslukonsulentur. Sonurin er útbúgvin á Handilsháskúlanum í Keypmannahavn og hevur arbeitt innan bankaheimin bæði í New York og London. Eisini hevur hann arbeitt sum leiðslu- og fyrisitingarráðgevari í Danmark.

Bæði hava longi havt hug til at byrja egna fyritøku, og tað hava tey so gjørt nú.

– Vit hava fingið eina flúgvandi byrjan innan fyri eitt øki, sum má sigast at vera sera viðkomandi í dag. Kost, venjingar og týdningin av at liva eitt sunt lív, sigur Eva Kucharski, sum hevur fingið donsku útgávuna av Helsvagten fram í Danmark. Ein kann royna hetta telduforritið ókeypis í eina viku á heimasíðuni hjá Helsevagten, sum er: www.helsevagten.dk

# Martin Joensen Band í Atlantis

**Leygarkvøldið 1. mai kl. 20.00 fer Martin Joensen við tónleikabólki at framføra eitt úrval av sangum sínum í Atlantis í Klaksvík**

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Martin man vera best kendur fyri løgini Ró og Morgun, sum bæði javnan eru at hoyra í loftmiðlunum.

Higartil eru 4 útgávur hjá Martini komnar á marknaðin: »Morgun« í 1985, »Skuggagestir« (við manning úr sangleikinum við sama heiti) í 1990, »Hált í Støðum« 1995 og »Áraløg« í 2002.

Tað verða serliga løg úr hesum útgávum, ið vera at hoyra leygarkvøldið. Men eisini løg, sum Martin hevur skrivað til onnur, millum annað Vestmenn, eru á skránni.

Martin er umboðaður við fleiri enn tríati sangum í Grønu Sangbók, umframt tveimum í Songbók Føroya Fólks.

Tónleikabókurin hjá Martini fevnir um væl royndar kreftir í føroyska tónleikaumhvørvinum. Nevniliga Paula Magnussen, sum leggur botn undir við tryggum og skapandi bassspæli, eminenta guitarleikaran Eyðun Mohr Hansen, og trummusnillingin úr Sandoynni, Jónleif Jensen, sum hevur lært mangan vónarríkan ungling fyrstu taktsløgini á rútmutrummuna og hi-hattin. Martin spælir sjálvur akkustiskan guitar og syngur.

Stutt sagt kunnu tey, ið leita sær inn í Atlantis leygarkvøldið vænta sær eina akkustiska ferð gjøgnum tónleikauniversið hjá Martini Joensen, har rúm er fyri bæði friðarligu Morgun- balladunum, svingandi Trýssunum og rokkandi Svarta Ravninum.

## Uppgávuhefti til Virkið

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út uppgávuhefti eftir Heðin Samuelsen til bókina Virkið. Heftið er partur av røðini í virkisbúskapi, sum er ætlað til undirvísing í handilsskúla og øðrum miðnámsskúlum, men eisini til sjálvlestur hjá teimum, ið hava áhuga fyri virkisbúskapi.

Virkið er fyrsta bókin í bókarøðini um virkisbúskap á B stigi eftir Olav Absalonsen og Heðin Samuelsen. Hinar tríggjar bøkurnar í røðini eru Fyriskipan, Kostnaðarlæra og Bókhald og ársroknskapur.

Uppgávuheftið til Virkið er 40 síður og kostar 68,00 krónur.

## Stór leitingarferð eftir Nóa ørk

**10 granskarar úr USA og Turkalandi ætla sær at nýta ein mánaða á hægsta fjalli Turkalands, Ararat, at leita eftir ørkini hjá Nóa**

RANNSÓKNARFERÐ
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Í hitabylgjuni seinasta summar, tiðnaðu fleiri tons av Ísi á tindinum á Ararat.

Síðani tá, hava granskarar tikið myndir av 5 kilometur høga fjallinum, og halda seg hóma okkurt, sum kundi líkst einum 150 metur longum skrokki.

Turkiska stjórnin hevur enn ikki góðkent leitingina. Seinastu árini hevur tó borið til at sloppið niðan á Ararat, sum undir kalda krígnum var stongt fyri rannsóknarferðum.

– Vit ætla ikki at taka nakað úr ørkini, skuldi tað eydnast okkum at funnið hana – og um Gud vil – sleppa tit øll at síggja hana, sigur, Daniel P. McGivern, leiðarin av Shamrock the Trinity Corporation of Honolulu.

*Kelda: Jyllands Posten*